# Viðskiftatreytir

## Deild rokning

Hetta skjal greiðir frá viðskiftatreytunum fyri haldinum ”Deild rokning” galdandi frá 8.oktobur 2013.

**Viðskiftatreytirnar fevna um ”Deild rokning”.**
Hesar viðskiftatreytirnar eru sertreytir í mun til Almennu Viðskiftatreytirnar hjá Føroya Tele. Um samsvar ikki er millum hesar viðskiftatreytir og Almennu Viðskiftatreytirnar, eru tað hesar, sum eru galdandi. Har einki verður nevnt í hesum treytum, eru Almennu Viðskiftatreytirnar hjá Føroya Tele galdandi.

**Deild rokning**
Við ”Deild rokning” gevur Føroya Tele kundum møguleika fyri at deila eina rokning.
Deildar rokningar kunna bert gerast av heilum mánaðum.
Føroya Tele kann ikki ábyrgdast fyri, um annar parturin broytir ella uppsigur deildu rokningina.

**Serlig viðurskifti**

- Kundi 1 er eigari av haldinum og ger avtalu við Kunda 2 um at tekna eitt ”Deild rokning” hald.
- Kundi 1 og Kundi 2 hava hvør sær skyldu at gjalda sínar partar av deildu rokningini smb. §7 Gjaldstreytir í Almennu Viðskiftatreytum.
- Um haldið ”Deild rokning” ikki verður goldið av Kunda 2, tilskilar Føroya Tele sær rætt til at áleggja Kunda 1 at gjalda rokningina.

**Broytingar**
Broytingar, ið sum heild eru til fyrimuns fyri kundan, kunnu setast í verk beinanvegin og uttan aðra ávaring frammanundan. Aðrar broytingar kunnu setast í verk við minst 1 mánaða ávaring til eitt mánaðarskifti.

FØROYA TELE

Postsmoga 27
110 Tórshavn
Tel 30 30 30
ft@ft.fo

www.ft.fo